Bilar

Nr. 15 • Fríggjadagur • 21. januar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo



*Nakrir av nýggjastu Lexus-bilunum hava eina skipan, har bilurin bremsar sjálvur*

# Intelligentir bilar

**Hóast tann fullkomni bilurin enn ikki er uppfunnin, verða bilarnir alt meira intelligentir. Nakrir av nýggjastu bilunum eru so framkomnir, at teir aktivt hjálpa bilføraranum at umgangast ferðsluvanlukkur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Visiónin um at bilarnir sjálvir kunnu bremsa og kanska eisini koyra uttan um, tá ein samastoytur er óumgongiligur, kom eitt stig nærri í 2005. Nakrir av nýggjastu bilunum eru so framkomnir, at teir aktivt hjálpa bilføraranum at umgangast ferðsluvanlukkur. Bilførarin hevur tó fullu ábyrgdina av sínum bili.

Bæði Toyota/Lexus og Mercedes-Benz hava longu nú bilar á marknaðinum, sum kunnu varnast ein vanda, gera bilin kláran til ein samanstoyt og í ein vissan mun bremsa sjálvir. Volvo eru eisini komnir langt á hesi leið.

Mercedes-Benz hava eitt system, ið kallast “Presafe”, ið virkar soleiðis at um bilurin við hjálp av ABS- og ESP-skipanunum registrerar at nakað er áfatt, verða t.d. strammararnir í trygdarbeltunum aktiveraðir, opnir rútar latast aftur og bremsurnar verða settar í tilbúgvingarstøðu. Á nýggjasta S-klassanum hjá Mercedes-Benz er skipanin víðkað við einum radara, so bilurin sjálvur kann boða frá, at ein samanstoytur nærkast og geva føraranum eina ávarðing. Um bilførarin ikki traðkar fast nokk á bremsupedalin, økir bremsuskipanin sjálv um bremsutrýstið.

Toyota hava eitt líknandi system á nýggjastu Lexus-bilunum, og á modellum ið einans verða seld í Japan, eru teir farnir eitt stig víðari við tað at um bilførarin í eini tilbúgvingarstøðu byrjar at bremsa hóvliga, vil bilurin taka yvir og bremsa við fullari megi. Um bilførarin als eini ger, vil bilurin til síðst bremsa av sær sjálvum, men tá kann tað sjálvandi vera ov seint.



*Mercedes-Benz S hevur eitt system, ið kallast “Presafe”, sum við hjálp frá ABS- og ESP-skipanunum registrerar um nakað er áfatt*




*Nýggjasta S-klassanum hjá Mercedes-Benz hevur eina skipan við einum radara sum boðar frá um ein samanstoytur nærkast*

# Krevja filtur á brúktar dieselbilar

**Brúktir dieselbilar skulu hava partikkulfiltur sett í útstoytið áðrenn teir verða seldir. Tað skjóta átta danskir heilsu- og umhvørvisfelagskapir upp**

BILAR
*Rani Nolsøe Johannessen*
*Poul Hallur Davidsen*

Miðskeiðis í desembur mánað 2005 fekk danski statsministarin Anders Fogh Rasmussen eitt skriv sendandi, ið heitti á hann um at gera okkurt við partikkuldálkingina frá bæði bilum og brenniovnum.

Hesar serliga vandamiklu ultrafínu partikklarnir føra árliga við sær fleiri túsund tilburðir av lungnabruna og hjartasjúkum. Eisini veksur nýtslan av dieselbilum og brenniovnum alsamt, siga felagskapirnir.

Astma-Allergi Forbundet, Kræftens Bekæmpelse, Danmarks Lungeforening, Dansk Cyklist Forbund, Greenpeace, Danmarks Naturfredningsforening og Det Økologiske Råd hava lagt fram sjey upskot víðvíkjandi pariklum í ferðsluni. Eitt teirra er - at allir brúktir dieselbilar skulu hava partikkulfiltur ísett tá teir verða seldir - .

Svarið frá politikkarunum kemur frá umhvørvisministaranum, Connie Hedegaard, tá Fólkatingið tann 20. januar viðgerð uppskot frá fýra av andstøðuflokkunum um eitt átak ímóti dálking av partikklum í ferðsluni.

ES - kommisiónin kom við einum uppskoti beint fyri jól, um at myndugleikarnir ganga undan við einum góðum fyridømi og avseta ein fjórðing av teirra árligu innkeypum av bilum til minni dálkandi akfør.

